## Sólarmagn vitjar Vágs kirkju



Hetta vikuskiftið er kórið Sólarmagn farið á venjingarlegu í Suðuroy. Í vetur hevur kórið arbeitt við skránni til eina Várkonsert, sum skal verða í høvuðsstaðarøkinum seinni í ár. Men í fyrsta umfari er kórið farið suðureftir at brýna tónleikin í Vágs kirkju.
Vágs kirkja er tiltikin fyri góð ljóðviðurskifti. Kórið venur dagliga í trongum umstøðum og gleðir seg tí til at royna síni evnir í hesum framúr góða kirkjurúmi, har góð hjálp fæst úr akustikkinum.

Kórið fer at enda venjingarleguna við eini óhátíðarligari konsert og tey vóna, at sanghugaðir suðuroyingar koma at lurta – og kritisera. Skráin er blandað, men meginparturin er svenskur tónleikur. Fróði Sandoy stjórnar kórinum. Konsertin verður leygardagin 13. januar klokkan 17.

# Visjónir um arbeiðsmarknaðin






VISJÓN 2015

**Strategibólkurin fyri arbeiðsmarknað hevur lagt fram uppskot til hoyringar um framtíðar arbeiðsmarknað.**

VISJÓN 2015
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Strategibólkarnir fyri arbeiðsmarknað, infrakervi og tilfeingi hava sent uppskot síni til hoyringar. Í pappírunum lýsa strategibólkarnir hvørji mál eiga at verða sett fyri økini, og hvat eigur at verða gjørt, fyri at røkka málunum.

Í blaðnum í dag vísa vit á niðurstøðurnar hjá bólkinum, sum hevur arbeitt við arbeiðsmarknaðinum. Vónin er, at vit fáa høvi til at vísa til strategipappírini frá hinum báðum bólkunum í einum av komandi bløðunum.

### Líður móti endanum

Sambært heimasíðuni hjá landsstýrinum um Visjón 2015, líður væl við arbeiðinum at leggja Visjón 2015 til rættis. Sambært tíðarætlanini eru nú bert trígg-ir bólkar eftir, sum skulu leggja tilfar út til hoyringar. Tað bólkarnir, sum viðgera alheimsgerð, samfelagsbygnað og vælferð.

Tá allir strategibólkarnir eru lidnir við síni strategipappír, verður tilfarið savna í eitt rit, ið verður handað Landsstýrinum.

### Aðalmálið sett

Umframt embætisfólk og fólk við løgfrøðiligum førleikum, hevur bólkurin um arbeiðsmarknað verið mannaður av fólki frá arbeiðsmarknaðinum, bæði løntakara- og arbeiðsgevarasíðuni.

Tey siga, at aðalmálið fyri føroyska arbeiðsmarknaðin er ein vælvirkandi, menn-andi, tryggur og rúmligur arbeiðsmarknaður, har tað er lætt hjá øllum at bjóða fram og fáa skikkaða arbeiðsmegi.

### Rættlag á í 2010

Í niðurstøðuni sigur bólkurin, at í einum framtíðar samfelagi eru øll í størri mun virkin og før fyri at umstilla seg til nýggjar umstøður.

- Yvirskipaða málið er ein vælvirkandi arbeiðsmarknaður, har sáttmálar, arbeiðsmarknaðarlóggáva og arbeiðsmarknaðarskipanir samvirka, soleiðis at ósemjur og trætumál á arbeiðsmarknaðinum verða loyst skjótt og á rætta staði. Allar arbeiðsmarknaðarlógir og allar arbeiðsmarknaðarskipanir skulu vera dagførdar innan 2010 og síðan dagførdar við jøvnum millumbilum, skjýtur bólkurin upp.

### Trivnaðin upp

Ein háttur at draga arbeiðsmegi til sín og millum annað eisini at minka um sjúkufráveruna, er at seta trivnaðin á arbeiðsplássunum í hásæti. Gott arbeiðsumhvørvi er ein av hornasteinunum í hesum sambandi.

Arbeiðsloysisskipan og arbeiðsávísing eru øki, sum partarnir á arbeiðsmarknaðinum hava staðið fyri at skipa. Partarnir á arbeiðsmarknaðinum skulu framhaldandi varða av hesi skipan.

- Høvuðsendamálini við henni er at hjálpa teimum fíggjarliga, sum gerast arbeiðsleys, at gera tað smidligt at skifta arbeiði og at útvega arbeiðsmegi. Útgjaldið til arbeiðsleys skal tryggja tí arbeiðsleysa nøktandi kor, verður sagt.

### Partarnir áseta

Í Føroyum eins og í hinum Norðurlondunum eru tað partarnir á arbeiðsmarknaðinum, sum við ásetingum í sínámillum sáttmálum skipa viðurskiftini á arbeiðsmarknaðinum. - Tað, sum partarnir ikki vilja ella ikki eru førir fyri at skipa í sáttmála, verður skipað við lóg, sigur bólkurin.

Hetta hevur við sær støðugan og liðiligan arbeiðsmarknað, og vit eiga at halda fast við hendan leistin.

### Lívslong læra

Strategibólkurin staðfestir, at yvirskipaða málið er lívslong læra. Øll, sum í størri ella minni mun eru knýtt at arbeiðsmarknaðinum, verða partur av eini førleikamenningarskipan. Á tann hátt kunnu hesi altíð økja um førleikar sínar, og hevur hetta við sær, at fakliga flytførið eisini verður økt.

- Arbeiðstøka arbeiðsmegin, harundir eisini leiðslan, skal støðugt førleikamennast, eitt nú við skeiðum og styttri útbúgvingum. Serligur dentur skal leggjast á at førleikamenna ófaklærda arbeiðsmegi. Framhaldandi eftirútbúgvingarskipanir skulu skipast, soleiðis at málið um førleikamenningartilboð til øll, uttan mun til starv, kyn og bústað, kann verða rokkið, siga tey í uppritinum.

### Eftirløn til øll

Yvirskipaða málið í mun til tann trygga arbeiðsmarknaðin eru persónligar eftirlønarskipanir, sum samvirka við fólkapensjónina og samhaldsfóstu arbeiðsmarknaðarskipanina. Samfelagið hevur evstu ábyrgd av, at øllum er tryggjað lívsgrundarlag við pensjónsaldur. Til tess at tryggja fíggjarligt lívsgrundarlag í pensjónsaldri, skulu øll, sum eru á arbeiðsmarknaðinum, gjalda í eina alment góðkenda eftirlønar-skipan.

### Rúm fyri øllum

Í mun til tann rúmliga arbeiðsmarknaðin, skal rúm vera fyri øllum á arbeiðsmarknaðinum.

- Øll skulu kunnu hava eitt virkið arbeiðslív, og eingin skal vera fyri mismuni á arbeiðsmarknaðinum, hvørki av skerdum arbeiðsførleika ella aldri. At skapa rúm fyri fólki við skerdum arbeiðsførleika er ein gagnlig íløga, ikki bert hjá viðkomandi fólki, men eisini hjá arbeiðsplássunum og samfelagnum sum heild. Fólk við skerdum førleika eru virðismikil arbeiðsmegi, sum arbeiðsgevarum fer at tørva framyvir, sigur bólkurin.

### Góðar liviumstøður

Bólkurin sigur, at síðst, men ikki minst, skal tað vera lætt at bjóða fram og fáa skikkaða arbeiðsmegi.

- Í hesum sambandi er yvirskipaða málið at beina burtur allar forðingar fyri at bjóða fram og fáa skikkaða arbeiðsmegi, bæði tá talan er um arbeiði í Føroyum og uttanlands, verður borið fram.

Og skoytt verður uppí, at Føroyar skulu allar vera ein arbeiðsmarknaður.

- Ein av fortreytunum fyri hesum er, at samferðslukervið skal vera vælútbygt, ferðakostnaðurin millum heim og arbeiðspláss lágur, eins og at bústaðar- og barnaansingarmøguleikarnir skulu vera góðir um alt landið.

### Arbeiðsmegi millum lond

Tað skal vera lætt hjá føroyingum at bjóða fram arbeiðsmegi sína uttanlands, og útbúgvingarkrøv, útbúgvingarstandardir, løggildingar o.a. skulu sostatt vera í samsvari við krøvini aðrastaðni.

Bólkurin sigur, at er ikki nóg mikið av (skikkaðari) arbeiðsmegi tøk í Føroyum, skal vera lætt hjá arbeiðsgevara at fáa neyðuga útlendska arbeiðsmegi ta tíðina, ið tørvurin er. Hetta skal fremjast soleiðis, at útlendsk arbeiðsmegi virkar undir teimum treytum, sáttmálum og lógum, sum galda í Føroyum.

### Í bólkinum um arbeiðsmarknað vóru

- Maria Róin, deildarstjóri, formaður
- Snorri Fjalsbak, deildarstjóri
- Alfred Petersen, formaður stýrið ALS
- Kári á Rógvi, løgfrøðingur
- Kristoffur Laksá, stjóri
- Gunnleivur Dalsgarð, formaður í Starvsmannafelagnum
- Vígdis Johannesen, forkvinna í Havnar Arbeiðskvinnufelag
- Joanna Djurhuus, fulltrúi
- Sólrun Gleðisheygg, journalleiðari